# Sundalagið bjóðar seg eisini fram

**- Vit hava lagt dent á at gera úrvalið av eitt nú amboðum betri, eins og vit hava fleiri merkjavørur innan gávulutir, sigur Elin Dam Dahl hjá Stanley við Norðskála**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í Sundalagnum vilja tey eisini hava sín part av »køkuni«, nú tunnilsdagur verður leygardagin*

Tað verður ikki bara handilslívið við Skálafjørðin og í Klaksvík, sum bjóða seg fram, nú ókeypis verður at koyra um Norðoyatunnilin leygardagin.

Handlar og tænastuveitarar við Streymin, sum vit plaga at siga, vilja eisini hava sín part av »køkuni«, nú høvi býðst.

### Veksandi handilslív

Øll, sum koyra fram við Norðskála og Oyrarbakka, hava lagt til merkis, at nógv bygging seinastu árini hevur verið norðanfyri brúnna, eystaru megin.

Nýggir handlar hava stungið seg upp, eins og gamlir handlar hava fingið nýggj høli og betri umstøður.

Gamla fyritøkan hjá Stanley, sum í fleiri ár húsaðist í einum kjallara við Norðskála, flutti í oktober í 2006 í nýggj høli.

Tað eru tær báðar, Maria Højsted Dam og Jóhanna Dam Dahl, sum eru stjórar og reka familjufyritøkuna í dag.

Hjá Stanley arbeiða fýra konufólk, og vanliga eru einar tríggjar til arbeiðis í senn.

### Størri útboð

Stanley selir næstan alt millum himmal og jørð.

- Vit hava eitt nú gávulutir, prýðislutir, merkjavørur, máling og amboð, sigur Elin Dam Dahl, dóttir Jóhonnu, sum vit hittu í telefonini í morgun.

Hon vísir á, at vøruúrvalið er nógv økt, síðan tey fingu betri umstøður, og tað er talið av viðskiftafólki eisini.

- Vit hava eisini lagt dent á at gera úrvalið av eitt nú amboðum betri, eins og vit hava fleiri merkjavørur innan gávulutir.

Elin Dam Dahl sigur, at Stanley fer at hava onkur tilboð, nú tunnilsdagur verður leygardagin.

Aðrir handlar og tænastufyritøkur, sum á ymiskan hátt fara at »markera« tunnilsdagin í Sundalagnum leygardagin, eru Brá, Lissan, Monroe og Shell-støðin á Oyrarbakka.


